# Familjutrygd

# tryggingartreytir

TRYGD

nr. 7-01

www.trygd.fo

# Innihaldsyvirlit

**Tryggingartreytir fyri familjutrygd.**


| | | |
|---|---|---|
| **A.** | **Hvønn fevnir tryggingin um og á hvørjum staði** | **Síða** |
| 1. | Hvør er tryggjaður? | 5 |
| 2. | Á hvørjum støðum tekur tryggingin við? | 5 |
| **B.** | **Innbúgvstrygging** | **Síða** |
| 3. | Hvørjar lutir verður endurgjald veitt fyri? | 6 |
| 4. | Hvørji skaðasløg fevnir tryggingin um? | 7 |
| 5. | Endurgjald á ferðum | 10 |
| 6. | Bjargingarútreiðslur, flytiútreiðslur og skjalprógvaðar meirútreiðslur av fráflyting | 10 |
| 7. | Endurgjaldsuppgerð | 10 |
| **C.** | **Ábyrgdartrygging** | **Síða** |
| 8. | Privatábyrgd | 13 |
| **D.** | **Rættarhjálpartrygging** | 15 |
| 9. | Rættarhjálpartrygging | 15 |
| **E.** | **Ískoytistrygging fyri innbúgv** | **Síða** |
| 10. | Glas- og kummutrygging | 15 |
| 11. | Endurgjald fyri el-skaða I (harðar hvítvørur) | 16 |
| 12. | Endurgjald fyri el-skaða II (uttan harðar hvítvørur) | 17 |
| **F.** | **Felagsreglur** | **Síða** |
| 13. | Rindan av tryggingargjaldi | 18 |
| 14. | Indeksjavnan av tryggingargjaldi, tryggingarupphæddum og sjálvsábyrgd | 18 |
| 15. | Aðrar broytingar av tryggingargjaldi, tryggingarupphæddum, sjálvsábyrgd ella tryggingartreytum | 18 |
| 16. | Gildistíð og uppsøgn | 18 |
| 17. | Flyting og váðabroytingar | 18 |
| 18. | Skaðafráboðan | 18 |
| 19. | Trygging í øðrum felagi | 19 |
| 20. | Krígs-, jarðskjálvta- og kjarnorkuskaði | 19 |
| 21. | Kærunevndin | 19 |
| 22. | Sjálvsábyrgd | 19 |

# Familjutrygd tryggingartreytir

**Familiens Basisforsikring**

(Sáttmáli millum Danska Brúkararáðið og Ráðið fyri Danska Trygging og Pensión)

ið fevnir um:
- innbúgvstrygging
- ábyrgdartrygging
- rættarhjálpartrygging

Somuleiðis ískoytistrygging fyri:
- glas- og kummutrygging
- el-skaðatrygging

Tá familjutrygging er teknað, er týdningarmikið at vita hvørjir skaðar, tryggingin fevnir um. Í tryggingartreytunum stendur, hvat tryggingin fevnir um. Familjutryggingin fevnir um mangar váðar innan mong privat lívsøki, og tí kunnu tryggingartreytirnar hvørki vera heilt stuttorðaðar ella lættar at lesa.

Familjutryggingin fevnir um innbúgvstrygging, ábyrgdartrygging og rættarhjálpartrygging, glas- og kummutrygging og eisini el-skaðatrygging.

Í skaðaførum er tað serliga týdningarmikið at vita,
- um ein hoyrir undir tryggingarbólkin (deild 1 í tryggingartreytunum),
- um skaðin er hendur á staði, tryggingin fevnir um (deild 2 í tryggingartreytunum),
- um tryggingin fevnir um skadda lutin (deild 3 í tryggingartreytunum),
- um tryggingin fevnir um slíka skaðahending (deildirnar: 4-12 í tryggingartreytunum).

Royndir vísa, at tað serliga kann vera trupult hjá tryggingartakarum at fáa greiði á innbúgvstryggingini (serstakliga deild 4 í tryggingartreytunum).

Tryggingartreytirnar eru skipaðar soleiðis, at undir teim einstøku pettunum verða fyrst tey føri nevnd, ið tryggingin fevnir um. Síðan verða tey føri nevnd, ið tryggingin ikki fevnir um - og undir teim verður serstakliga nevnt, um tryggingin kortini í ávísum umstøðum veitir fulnað.

Tá tryggingartreytirnar verða lisnar, er serliga umráðandi at gáa um yvirskriftirnar og minnast yvirskriftina.

# A. Hvønn fevnir tryggingin um og á hvørjum staði?

**Deildir 1-2**

## 1. Hvør er tryggjaður?

1.1 **Tryggingartakarin við húski og fastbúgvandi hjálparfólki í húsarhaldinum.**

Við húski er at skilja: húsfólkið, her ímillum fosturbørn, sum búgva hjá tryggingartakaranum, og somuleiðis persónar, ið ávikavist eru giftir við tryggingartakaranum ella liva í føstum parlagi saman við honum ella heimabúgvandi børnum, treytað av, at viðkomandi persónar eru tilmeldaðir fólkayvirlitinum við føstum bústaði á sama staði sum tryggingartakarin.

Búfelagsskapur av í mesta lagi 2 persónum verður javnmettur við fast parlag.

Ógift børn (undir 21 ár) hjá einum í húskinum, sum ikki búgva heima, eru eisini tryggjað; tó treytað av, at barnið ikki livir í føstum parlagi ella hevur fastbúgvandi børn hjá sær.

Tryggingin fevnir ikki um tey, ið búgva til leigu.

Fellur endurgjaldsrætturin burtur orsakað av broyting í omanfyri nevndu viðurskiftum, er viðkomandi kortini tryggjaður, til onnur trygging er teknað, tó í mesta lagi 3 mánaðir frá broytingini.

1.2 Ikki-fastbúgvandi hjálparfólk í húshaldinum, men bara viðvíkjandi ábyrgdartrygging (deild 8) og eittans viðvíkjandi verki, sum útint er í sambandi við húshald tryggingartakarans.

## 2. Á hvørjum støðum tekur tryggingin við?

2.1 Við teim avmarkingum, ið eru ásettar í 3. og 4. deild, veitir innbúgvstryggingin endurgjald, tá ið lutirnir eru:

2.1.1 í heilársbústaði hjá tryggjaða. Tryggingin fevnir um fráflyting - í upp til 1 mánað frá yvirtøkudegnum viðv. nýggja heilársbústaðnum - bæði fyri gamla og nýggja heilársbústaðin. Um skaða undir sjálvari flytingini við ferðsluóhappi - sí stk. 4.6.2.1. Sí eisini deild 17 um flytingar og váðabroytingar,

2.1.2 í kundaboks í banka ella sparikassa,

2.1.3 í goymslurúmi, flutningsbili ella bingju.

2.1.4 **Herumframt fevnir tryggingin um:**
Tryggjaðar lutir í frítíðarhúsi:

2.1.4.1 Tá ið lutirnir eru havdir við úr heilársbústaðnum í frítíðarhús ta tíð, ein tryggjaður býr har. Vikuskiftisteðgir bera ikki við sær, at staðið er at meta sum tilhald/bústaður í tíðarbilunum millum vikuskiftissteðgirnar. Tryggingin fevnir um frítíðarhúsið í tíðarskeiðinum 1. juni til 31. august, hóast manntómt.

2.1.4.2 Tá ið vanligt privat innbúgv (stk. 3.1) uttan fyri tað í stk. 2.1.4.1 nevnda tíðarskeið fyri eina tíð er havt við, hóast hin tryggjaði hevur ikki búð har. Lutirnir skulu tó vera í frítíðarhúsinum.

2.1.5 Tryggjaðar lutir, ið eru havdir við úr heilársbústaðnum í húsvogn, tjald ella stuttleikabát, so leingi hin tryggjaði heldur til ella liggur nátt har.

2.1.6 Tryggjaðar lutir, sum annars fyribils eru uttan fyri tryggingarstaðin, sbr. pkt. 2.1.1. Uttan serliga avtalu við felagið, eru bert teir fyrstu 12 mánaðirnir av tilhaldinum uttan fyri tryggingarstaðin umfataðir av tryggingini, sí serstakliga stk. 2.1.6.3. Sum fyribils verandi uttan fyri tryggingarstaðin verða eisini mettir:

2.1.6.1 Lutir, ið ætlaðir eru at flyta aftur á tryggingarstaðin.

2.1.6.2 Lutir, ið eru fingnir til vega við teirri ætlan at hava á tryggingarstaðnum.

2.1.6.3 Lutir, sum eru uttan fyri tryggingarstaðin, tí ætlanin er at selja teir. Kortini bert teir fyrstu 2 mánaðirnar.

2.1.7 Fyri lutir, ið havdir vera við á uttanlandsferðum, galda serligar treytir. Sí 5. deild

2.2 **Ábyrgdartryggingin og rættarhjálpartryggingin veita endurgjald í Føroyum.**
Uttanlands verður endurgjald veitt í upp til 3 mánaðir frá fráferðardegnum at rokna.

# B. Innbúgvstrygging

**Deildir 3-7**

## 3. Hvørjar lutir verður endurgjald veitt fyri?

**Tryggingin fevnir - við teim í 3.-6. deild nevndu avmarkingum - um niðanfyri nevndu lutir, um hin tryggjaði eigur teir ella hevur teir í ábyrgd. Viðv. endurgjaldi fyri læntar ella leigaðar lutir (ella dýr) verður víst til stk. 8.4.11.**

### 3.1 Vanligt privat innbúgv.

**Vanligt privat innbúgv** eru privatir ognarlutir, undir hesum alt, ið hoyrir til vanliga útbúnaðin í einum privatbústaði, um hetta er ikki serstakliga tilskilað í stykkjunum 3.2-3.8 ella undantikið sambært stk. 3.9.

### 3.2 Serligt privat innbúgv.

Sum **serligt privat** innbúgv skilst:
- Antikvitetir (forngripir).
  (Antikvitetir, hvørs meginvirði er gull, silvur ella platin, verða tó umrøddir sum serligir privatir virðislutir sbr. gjøllari stk. 3.4).
- Band- og plátuspælarar.
- Bond, kassettur, plátur og fløgur.
- Telduútbúnaður.
- Forsterkarar.
- Fotoútbúnaður og filmar.
- Hústeldur.
- Hátalaraútbúnaður.
- Kikarar.
- Listaverk.
- Málningar.
- Fartelefonir.
- Tónleikatól.
- Skinnfrakkar.
- Feldvøra.
- Radioamatørútgerð, her íroknað farradio.
- Útvarps-, sjónbanda-, og sjónvarpstól við útbúnaði.
- Skinn.
- Skinntoy.
- Rúsdrekka.
- Ur/klokkur.
- Vín.
- Vápn og lóður.
- Ektað teppi.

### 3.3 Peningur o.a.

Sum **peningur o.a** skilst:
- Peningur.
- Peningaumboðan, herundir m.a. óbrúkt frímerki og virðisbrøv. Endurgjaldið er í mesta lagi kr. 13.200.

### 3.4 Serligir privatir virðislutir.

Sum **serligir privatir virðislutir** skilst:
- Frímerkjasøvn.
- Lutir, hvørs meginvirði er gull, platin ella silvur.
- Myntasøvn.
- Perlur. *
- Prýðislutir.
- Gimsteinar. *

Eru teir við * merktu gripir høvuðspartar av luti, verður hann flokkaður her, hóast hann eisini kundi flokkast undir annan bólk av tryggjaðum lutum. Endurgjaldið er í mesta lagi 15% av tryggingar-upphæddini.

### 3.5 Vanlig húsdýr, ið ikki verða nýtt til vinnulig endamál.

Fulnaðurin er avmarkaður upp til í mesta lagi 2% av tryggingarupphæddini.

### 3.6 Súkklur, tó í mesta lagi upp til 2% av tryggingarupphæddini. Endurgjaldið er tó altíð upp til kr. 7.900 fyri hvørja súkklu sær fyri hvønn skaða.

Súkklur við hjóltvørmáti styttri enn 12 tummar eru ikki at meta sum súkklur, men sum vanligt privat innbúgv.

### 3.7 Amboð, útgerð og tól, sum hin tryggjaði eigur, og sum hann sum lønmóttakari nýtir í arbeiði sínum.

Endurgjaldið er í mesta lagi 4% av tryggingar-upphæddini.

### 3.8 Bygningslutir, sum hin tryggjaði sum leigari hevur viðlíkahaldsskyldu av, um so er, at bygningstrygging fyri ognina ikki fevnir um teir.

Endurgjald verður bert veitt fyri skaða av stuldri og herverki.

### 3.9 Tryggingin fevnir ikki um:

motorakfør, prutl, urtagarðsamboð yvir 5 hk, húsvognar, flogfør ella sjógangandi før av øllum sløgum, ei heldur brimfjalir og lutir og útgerð til teirra.

# B. Innbúgvstrygging

## 4. Hvørji skaðasløg fevnir tryggingin um?

**4.1 Eld, snarljós, ið slær niður, spreinging o.a.**

4.1.1 Tryggingin fevnir um skaða á tryggjaðar lutir, ið stendst av:

4.1.1.1 Eldi (eldsváða).

4.1.1.2 Snarljós, ið slær niður, beinleiðis í tryggingarstaðin ella í bygningin, har tað tryggjaða er.

4.1.1.3 Spreinging.

4.1.1.4 Brádligari sótdálkan frá útbúnaði til upphiting, ið uppsettur er sambært fyriskipanini.

4.1.1.5 Niðurdotnum flogfari ella lutum av tí.

4.1.1.6 Eldi, í svíðing, bræðing ella kolan av klæðum í heilautomatiskum vaskimaskinum og turkitrumlum, er skaðin elvdur av mekaniskum ella tekniskum breki. Er turrkókað verður allur klædnaskaði goldin.

**4.1.2 Tryggingin fevnir ikki um:**

4.1.2.1 Skaði, ið bert er svíðing, bræðing ella smá hol, um skaðin ikki er elvdur av ótamdum eldslogum, ella tað snýr seg um skaðaføri fevnt av stk. 4.1.1.6.

4.1.2.2 Skaði á lutir, sum við vilja verða fyri eldi ella hita, uttan so at tað snýr seg um skaðaføri fevnt av stk. 4.1.1.6.

**4.2 Leki**

4.2.1 Tryggingin rindar fyri skaða á tryggjaðar lutir, ið eru vorðnir skaddir av vatni, olju, køliløgi ella slíkum, sum brádliga floymir úr rørútbúnaði, innleggingum ella fiskabúrum og øðrum tangum, ið taka 20 litrar ella meira. Rennustokkar og takrennur eru ikki mettar sum innleggingar ella íløt. Stavar skaðin frá fjaldum vatn-, hita- ella frárenningarrørum í bygninginum, tekur tryggingin eisini við, er talan um at vatnið seyrar frá. Fjald rør eru rør millum skins og hold, í veggjum ella gólvum, og rør í rørkømrum, krúpikjallarum, úti undir væðingini og slíkum lokaðum rúmum.

**4.2.2 Tryggingin fevnir ikki um:**

4.2.2.1 Skaða, sum stendst av frostspreinging í rúmum, sum hin tryggjaði hevur ræðið á, uttan so, at upphiting av tilvild hevur svikið.

4.2.2.2 Skaða, ið stendst av áfylling og tøming av oljutanga ella øðrum tangum.

4.2.2.3 Missin av tí løgi, ið rann burtur.

4.2.2.4 Skaða, ið stendst av grund- ella kloakkvatni, ið floymir upp, tí at kloakkrørini ikki svølgja, uttan so, at skaðin stavar frá viðurskiftum, tey tryggjaðu onga ávirkan høvdu á - sum ógvisligt glopraregn ella toybil (sí stk. 4.3.1.2).

4.2.2.5 Skaða í sambandi við byggi- ella umvælingararbeiði.

**4.3 Stormur og ávísur avfalsskaði.**

**4.3.1 Tryggingin fevnir um skaða á tryggjaðar lutir, ið stavar frá:**

4.3.1.1 Stormi, um bygningurin samstundis hevur fingið stormskaða. Vindurin er at meta sum stormur, tá ið vindmegin støðugt ella í hvirlum í minsta lagi er 17,2 m/sek.

4.3.1.2 Vatnflóð av tekjuni, jørðildi ella altani, ið stóðst av ógvisligum glopraregni ella toybili.

4.3.1.3 Tá vatni ella avfalli, um skaðin hevur beinleiðis samband við stormskaða ella annan bráðkomnan skaða á bygningin ella yvirbreiðingartilfarið á honum, um hetta hevur verið forsvarliga lagt og fest.

4.3.1.4 Umframt stk. 4.3.1.3 fevnir tryggingin eisini um skaða av távatni ella avfalli, ið brádliga setir gjøgnum rivur ella op í bygninginum, um rivurnar ella opini stava frá hending samstundis ella beint frammanundan at vætan setti inn.

Sjálvsábyrgd er í hesum føri kr. 1.144. Er trygging teknað við hægri vanligari sjálvsábyrgd, er tað henda vanliga, ið er galdandi.

4.3.1.5 Skaða, ið stendst av omanlopi. Við omanlop er at skilja: Grót, ið rapar úr homrum, líðum og brekkum. Skalvalop. Skriðulop. Tá áir leypa, annaðhvørt orsakað av toybili ella av, at nógv avfall er, og vatn, runa, eyrur og tílíkt rakar ta tryggjaðu ognina.

**4.3.2 Tryggingin fevnir ikki um:**

4.3.2.1 Skaða á lutir uttan fyri bygningin.

4.3.2.2 Skaða, ið kemst av, at hin tryggjaði ikki hevur ómakað sær at reinsa frárenslini.

4.3.2.3 Skaða, ið stavar frá ov trongum frárenningarrørum uttan so, at talan er um leiguíbúðir.

4.3.2.4 Skaða, ið stendst av vatnflóð av sjógvi, firði, vatni ella á, uttan so at skaðin stavar frá einum bráðkomnum ógvusligum glopraregni ella toybili.

# B. Innbúgvstrygging

**4.4 Vatnskaði á tryggjaðar lutir hjá leigarum.**

4.4.1 Umframt teir í 4.2 og 4.3 nevndu vatn- og avfalsskaðar fevnir tryggingin eisini um skaða á tryggjaðar lutir hjá leigarum, sum stavar frá,

4.4.1.1 at avfall ella távatn spríkir gjøgnum rivur í bygninginum,

4.4.1.2 at vatn lekur úr rørum, ið liggja uttanfyri hølini, ið leigumál hins tryggjaða fevnir um.

**4.4.2 Tryggingin fevnir ikki um:**

4.4.2.1 Føri, har útleigarin antin eftir leigulógini ella leigusáttmálanum ikki hevur skyldu til at væla um leigubústaðin eftir vatnskaðan.

4.4.2.2 Skaði, í førum tá leigarin átti at havt boðað útleigaranum ella umboðsmanni teirra frá vatnskaðanum ella tí bygningsskaða, ið elvdi skaðan, og leigarin ikki er førur fyri at gera sannlíkt, at hann hevur boðað frá.

4.4.2.3 Krav, ið roynd ikki er gjørd at reisa ímóti útleigaranum í førum, har hann má metast at hava endurgjaldsskyldu.

4.4.2.4 Krøv, ið eru goldin av útleigaranum.

4.4.2.5 Skaða á lut uttan fyri bygningin.

4.4.2.6 Skaða, har hin tryggjaði hevur latið vera við at avmarka skaðan á innbúgvið.

**4.5 Køli- og djúpfrostskaðar.**

**4.5.1 Tryggingin fevnir um:**

4.5.1.1 Skaða á vørur við í mesta lagi upp til 2% av tryggingarupphæddini í køli- og djúpfrystiútbúnaði í heilársbústaðnum, ið stendst av tilvildarligum steymsliti ella frystarasvíki.

4.5.1.2 Skaði á køli- og djúpfrystiútbúnað og innbúgvslutir, orsakað av tiðnaðu vørunum, er eisini fevndur av tryggingini í sambandi við skaða eftir stk. 4.5.1.1.

**4.5.2 Tryggingin fevnir ikki um:**

4.5.2.1 Um hin tryggjaði ella fólk, ið hin tryggjaði hevur at ansa eftir bústaðinum, hevur slitið streymin.

4.5.2.2 Skaða, ið verður goldin av garantii frá triðja manni, eitt nú seljara.

4.5.2.3 Skaða, har streymslitið ella tólsvikurin stavar frá vánaligum viðlíkahaldi, skeivari uppseting, konstruktión ella tólið hevur staði á skeivum plássi.

4.5.2.4 Skaða á frystiboksina, orsakað av tólsvíki, um boksin er meira enn 12 ára gomul.

**4.6 Ferðsluóhapp og sjóskaði.**

**4.6.1 Tryggingin fevnir um skaða á tryggjaðar lutir elvdur av:**

4.6.1.1 Ferðsluóhappi, har samferðsluakfar er blandað uppí (ákoyring, samanstoytur, kollkoyring).

Sum **samferðsluakfar** skilst:
- Motorakfør undir ferðslulógini.
- Tvíhjólaðar súkklur við yvir 12 tumma hjóltvørmáti.
- Tví- og tríhjólaðar súkklur við stellnummari.
- Hestavognar.
- Almenn samferðsluakfør.
- Avlamnisakfør

4.6.1.2 Skipbroti í stuttleikafari við undirdeks koyggjuplássum, har tryggjað hava hildið til sum ferðafólk. Endurgjaldið fevnir bert um vanligt og serligt privat innbúgv og kann ikki fara upp um kr. 13.200.

**4.6.2 Tryggingin fevnir ikki um**:

4.6.2.1 Skaða á flytigóðs ella annað góðs, sum verður flutt móti gjaldi.

4.6.2.2 Skaða á samferðsluakfarið.

4.6.2.3 Skaða á dýr.

**4.7 Stuldur**
Endurgjald verður veitt fyri stuldur eftir ásetingunum í endurgjaldsskránni. Sí næstu síðu

**4.8 Rán, álop o.a**

**4.8.1 Tryggingin fevnir um:**

4.8.1.1 Stuldur av tryggjaðum lutum farin fram undir nýtslu av/ella hóttan um bráðræsnan harðskap (rán).

4.8.1.2 Stuldur av lutum í námindum hins tryggjaða,
- um hin tryggjaði ella onkur annar hevur varnast stuldurin í tí bragdi, brotsmaðurin tók lutin, og viðkomandi í somu stund hevur rópt varskó, ella
- um stuldurin kann váttast av onkrum øðrum hjástaddum.

| | Innbrotsstuldur | Vanligur stuldur | |
|---|---|---|---|
| **Stuldurshugtøk/støð** | Stuldur í sambandi við at brotið verður inn í forsvarliga stongd hús ella høli. | Stuldur uttan fyri húsini ella úr ólæstum húsum ella høli. | Stuldur úr bilum, privatum sjó- og loftførum, húsvognum og tjøldum, sum fólk býr í. |
| **Tryggingin tekur ikki við:** | 1. Stuldur úr húsum, ið hava verið manntóm meira enn 6 mánaðir.<br><br>2. Innbrotsstuldur, ið ikki verður goldið fyri:<br><br>2.1 Stuldur úr hotellkamari, kahútt ella tokkliva uttan at innbrot við makt kann staðfestast.<br><br>2.2 Stuldur úr stuttleikafari. | 1. Gloymdir, burturmistir ella mislagdir lutir.<br><br>2. Stuldur framdur av einum øðrum tryggjaðum, hjálparfólki, leigara og javnsettum.<br><br>3. Stuldur av lutum úr manntómum, læntum ella útleigaðum húsum.<br><br>4. Goymslusettir lutir.<br><br>5. Stuldur, har hin tryggjaði hevur sýnt stórt ósketni. | 1. Gloymdir, burturmistir ella mislagdir lutir.<br><br>2. Stuldur framdur av einum øðrum tryggjaðum, hjálparfólki, leigara og javnsettum.<br><br>3. Stuldur av lutum úr ólæstum bilum, kamping-vognum, tjøldum, privatum sjó- og loftførum.<br><br>4. Stuldur uttan at innbrot við makt kann staðfestast. Kortini fevnir tryggingin um viðføri, ið havt verður á biltøkum.<br><br>5. Stuldur, um tryggjaði hevur sýnt stórt ósketni. |
| **Tryggjaðir lutir sambært stk.3** | **Avmarkingar av endurgjaldinum** | | |
| **Vanligt privat innbúgv, sbr. stk. 3.1.** | Í mesta lagi 5% av tryggingarupphæddini í<br>A. lofts- og kjallararúmum í fleirhæddahúsum.<br>B. úthúsum og bilskúrum. | Í mesta lagi 2% av tryggingarupphæddini í<br>A. lofts- og kjallararúmum í fleirhæddahúsum.<br>B. úthúsum og bilskúrum. | Í mesta lagi 2% av tryggingarupphæddini fyri viðføri á biltøkum. |
| **Serligt privat innbúgv, sbr. stk. 3.2.** | Ikki í<br>A. lofts- og kjallararúmum í fleirhæddahúsum.<br>B. úthúsum og bilskúrum. | Í mesta lagi 10% av tryggingarupphæddini í<br>A. Lofts- og kjallararúmum í fleirhæddahúsum.<br>B. Úthúsum og bilskúrum. | Í mesta lagi 5% av tryggingarupphæddini. Fyri lutir í bilum verður bert veitt endurgjald, hava lutirnir verið í læstum viðførisrúmi, avskildraðir frá bilrúminum og ikki vóru sjónligar uttaneftir. |
| **Pengar o.a. (í mesta lagi kr. 13.200), sbr. stk. 3.3.**<br>**Serligir privatir virðislutir (í mesta lagi 15% av tryggingarhæddini), sbr. stk. 3.4.** | Ikki í<br>A. lofts- og kjallararúmum í fleirhæddahúsum.<br>B. úthúsum og bilskúrum<br>C. bústaði, ið hevur staðið manntómur í yvir 2 mðr | **Endurgjald verður ikki goldið.** | **Endurgjald verður ikki goldið.** |
| **Súkklur, sbr. stk. 3.6.** | | Sí stk. 7 um lásakrøv o.a. | |
| **Amboð o.a., sbr. stk. 3.7.** | Kortini ikki úr arbeiðsskúrum. | **Endurgjald verður ikki goldið.** | **Endurgjald verður ikki goldið.** |
| **Vanlig húsdýr, sbr. stk. 3.5.** | | **Endurgjald verður ikki goldið.** | **Endurgjald verður ikki goldið.** |
| **Bygningslutir, sbr. stk. 3.8.** | | | **Endurgjald verður ikki goldið.** |

# B. Innbúgvstrygging

4.8.1.3 Stuldur av taskum við tí, sum er í, tá ið tær verða skræddar frá hinum tryggjaða. Endurgjaldið kann í mesta lagi vera kr. 13.200.

4.8.1.4 Annan skaða á tryggjaðar lutir í sambandi við álop á fólk, ið eru tryggjað.

**4.9 Herverk.**

**4.9.1 Tryggingin fevnir um:**

4.9.1.1 Herverk á tryggjaðar lutir innanveggja og uttanfyri heilársbústaðin (tryggingarstaðin). Herverk í sambandi við súkklustuldur ella slíkar royndir er fevnt av tryggingini, ástaðirnir óviðkomandi. Um endurgjald við flyting, sí eisini stk. 4.9.2.2.

4.9.1.2 Herverk á tryggjaðar lutir í frítíðarhúsum. Sí kortini stk. 2.1.4 um avmarkingar av endurgjaldinum.

4.9.1.3 Herverk á bygningslutir, ið hin tryggjaði sum leigari hevur umsitingarskyldu av, um eingin húsatrygging er fyri ognina, ið tekur við.

**4.9.2 Tryggingin fevnir ikki um:**

4.9.2.1 Føri, tá heilársbústaðurin hevur staðið manntómur yvir 6 mánaðir.

4.9.2.2 Herverk á serligt privat innbúgv, á pengar og virðisbrøv ella á serligar privatar virðislutir, um so er, at nevnda leysafæ er statt uttan fyri bústaðin hjá hinum tryggjaða. Undir flyting fevnir tryggingin kortini um bæði vanligt og serligt privat innbúgv.

4.9.2.3 Herverk gjørt av einum tryggjaðum, hjálparfólki, leigara ella øðrum, ið við samtykki hins tryggjaða ella annars á lógligan hátt er statt í heilársbústaðinum ella frítíðarhúsinum.

## 5. Endurgjald á ferðum

**5.1 Tryggingin fevnir um:**

5.1.1 Ferðing uttanlands og aftur og fram úr útlondum í upp til 3 mánaðir frá fráferðardegnum.

5.1.2 Endurgjald verður veitt eftir reglunum um innbústryggingina - tá ið lutirnir verða havdir við ella sendir sum ferðagóðs.

5.1.3 Innskrivað viðføri, ið sent verður við flogfari, toki ella flutningsmanni, er fevnt av tryggingini, um tað hvørvur ella verður skatt, annaðhvørt móttøkustaðurin er í Føroyum ella uttanlands.

**5.2 Tryggingin fevnir ikki um:**

5.2.1 Skaða, ið stendst av vánaligum pakkitilfari ella leka frá løgi, ið havdur hevur verið við.

5.2.2 Smáskaðar á kuffert og taskur.

5.2.3 Miss ella útreiðslur av seinkaðum viðføri.

5.2.4 Skaða, ið er fevndur av aðrari trygging, ið fevnir um viðføri.

## 6. Bjargingarútreiðslur, flytiútreiðslur og skjalprógvaðar meirútreiðslur av fráflyting

**6.1 Tryggingin fevnir um:**

6.1.1 Skaða á tryggjaðar lutir í sambandi við forsvarlig bjargingartiltøk at forða bráðhóttandi skaða á fólk ella lutir, ið onnur eiga.

6.1.2 Í sambandi við skaða, sum er fevndur av tryggingini, verður harumframt endurgoldið út um tryggingarupphæddina:

6.1.2.1 Rímiligar og neyðugar útreiðslur til bjarging, goymslu og upprudding.

6.1.2.2 Rímiligar og neyðugar útreiðslur til út- og innflyting.

6.1.2.3 Annar rímiligur og neyðugur meirkostnaður, goymsluútreiðslur íroknaðar, í upp til 1 ár í sambandi við flyting úr heilársbústaðinum.

6.1.3 Tær undir stk. 6.1.2 nevndu útreiðslur verða eisini endurgoldnar, um ein leigari, luthavari ella ánari av ognaríbúð orsakað av einum skaða, ið ein vanlig húsatrygging hevði fevnt um, ikki fær búð í heilárs-bústaðinum, og eigarin kann ikki verða kravdur at rinda útreiðslurnar.

## 7. Endurgjaldsuppgerð

**7.1 Endurgjaldið skal í mestan mun seta hin tryggjaða aftur í somu fíggjarligu støðu, hann var í, beint undan skaðanum. Felagið kann velja millum hesar hættirnar at bøta skaðan aftur:**

7.1.1 Seta lutin í sama stand sum undan skaðanum, so vítt tað letur seg gera.

Felagið rindar kostnaðin av at gera skaðan aftur. **Í sama standi, so vítt tað letur seg gera** merkir, at luturin í veitingarføri, brúki og útsjónd í øllum meginførum hevur sama gagnvirði hjá tí tryggjaða sum undan skaðanum. Eru umvælingarútreiðslurnar meira enn 50% av nývirðinum um skaðamundið, skal felagið áseta endurgjaldið eftir stk. 7.1.3 ella 7.1.4.

# B. Innbúgvstrygging

7.1.2 Samsýna virðisminkingina av skaddu lutunum.

Virðisminkingin verður roknað sum virðið á óskadda lutinum við frádrátti av virðinum á skadda lutinum. Eftir umstøðunum kann talan vera um bæði umvæling og endurgjald fyri virðisminking, um luturin eftir umvælingina er vorðin minni verdur. Eru umvælingarútreiðslurnar hægri enn 50% av nývirðinum um skaðamundið, skal felagið at áseta endurgjaldið eftir stk. 7.1.3 ella 7.1.4.

7.1.3 Útvega ella lata nýggjar lutir, ið eru samlíkir teim skaddu ella stolnu, um hetta kann gerast uttan munandi bága fyri tryggjaða.

Fáast meinlíkir lutir ikki, kann felagið - tá ið ræður um føri, har ið fult endurgjald í krónum hevði verið latið - í staðin lata líknandi nýggjar lutir, t.v.s. lutir, sum í virði, dygd, brúki og útsjónd samsvara teimum skaddu ella stolnu lutunum. Fyri ávísar lutir, ið eru keyptir brúktir ella eru meira enn 2 ára gamlir um skaðamundið, kann felagið bøta aftur við brúktum samlíkum lutum, um hetta kann gerast uttan munandi bága fyri tryggjaða.

Fyri lutir sum hesar, ið keyptir eru brúktir ella eru eldri enn 2 ár , kann felagið veita endurgjald við brúktum, samlíkum lutum, t.v.s. lutum, sum í virði, dygd, veitingarføri, brúki og útsjónd samlíkjast teim skaddu ella stolnu lutunum:

- Gull- og silvurvørur, tó ikki prýðislutir.
- Postalín, prýðisdiskar íroknaðir.
- Lampur.
- Glasvørur.

Setur hin tryggjaði seg ímóti nýútvegan, rindar felagið endurgjaldið í hondina samsvarandi prísinum, felagið skal gjalda fyri lutin hjá tí útvegara, felagið hevur ávíst.

7.1.4 Í aðrar mátar javna missin aftur í hondina.

Fyri lutir, ið eru keyptir nýggir, eru yngri enn 2 ár og annars óskaddir, verður endurgoldið við nýútveganar-prísinum á tilsvarandi nýggjum lutum.

Fyri lutir, eldri enn 2 ár, keyptir brúktir ella áður skaddir, verður endurgjaldið ásett sum nýútveganar-prísurin á tilsvarandi nýggjum lutum við rímiligum frádrátti fyri virðisminking av aldri, brúki, skerdum brúksvirði ella øðrum umstøðum.

Frádráttur fyri aldur ella brúk v.m. verður tó bert gjørdur, um gagnvirðið var munandi lækkað undan skaðanum.

Er nýútvegan í hendinga førum ógjørlig í verki, og má nýútveganarprísurin vegna tess verða settur við støði í, hvat tað kostar at framleiða tilsvarandi lut, hevur felagið tó ikki skyldu til at gjalda meira enn nýggjur lutur, ið rímiliga kann verða samanborin við skadda ella stolna lutin, kann útvegast fyri.

7.1.5 Avskrivingarreglur: Viðvíkjandi teimum lutum, ið serstakar avskrivingarreglur eru ásettar fyri, kann hin tryggjaði altíð, uttan so at felagið útvegar ella letur nýggjar lutir sbr. 7.1.3, krevja endurgjald goldið í hondina samsvarandi hesum reglum, um lutirnir annars vóru óskaddir:

**Súkklur** verða endurgoldnar eftir hesi talvuni:

| Aldur | |
|---|---|
| 0 - 1 ár | 100% |
| 1 - 2 ár | 90% |
| 2 - 3 ár | 81% |
| 3 - 4 ár | 73% |
| 4 - 5 ár | 66% |
| 5 - 6 ár | 59% |
| 6 - 7 ár | 53% |
| 7 - 8 ár | 48% |
| 8 - 9 ár | 43% |
| 9 - 10 ár | 39% |
| 10 - 11 ár | 35% |
| 11 - 12 ár | 32% |
| 12 - 13 ár | 29% |
| 13 - 14 ár | 26% |
| 14 - 15 ár | 23% |
| 15 - 16 ár | 21% |
| 16 - 17 ár | 19% |
| 17 - 18 ár | 17% |
| 18 - 19 ár | 15% |
| yvir 19 ár | 10% |

*av nýútveganarprísinum sum nýggj um skaðamundið*

# B. Innbúgvstrygging

**Elektrisk húsarhaldstól** og harðar hvítvørur, sum undan skaðanum annars vóru óskadd, verða endurgoldin eftir hesi talvuni:

| Aldur | |
|---|---|
| 0 - 2 ár | 100% |
| 2 - 3 ár | 90% |
| 3 - 4 ár | 80% |
| 4 - 5 ár | 70% |
| 5 - 6 ár | 60% |
| 6 - 7 ár | 50% |
| 7 - 8 ár | 40% |
| yvir 8 ár | 30% |

*av nýútveganarprísinum sum nýggj um skaðamundið*

Undir **elektrisk húsarhaldstól** verða roknað:
- Kaffimaskinur.
- Dustsúgvarar.
- Strúkijørn.
- Strúkirullur.
- Køksmaskinur (t.d. miksarar, hvirlur og kjøtmaskinur).
- Elektrisk ítrivsamboð.
- Hárturkarar.
- Rakimaskinur.
- Elektrisk ur.
- Band- og plátuspælarar.
- Forsterkarar.
- Hátalaraútbúnaður.
- Elektrisk ljóðføri.
- Útvarps-, sjónvarps- og sjónbandatól.

7.1.6 Roynast reglurnar í 7.1.1-7.1.5 ónýtiligar í eini skaðastøðu, verður endurgjaldið gjørt upp eftir teirri venju, sum annars er galdandi samsvarandi § 37 í Tryggingaravtalulógini.

7.2 Viðvíkjandi skaða á privatar films- ella bandupptøkur/telduforrit verður endurgjald bert veitt til keyp av nýggjum ráfilmum ella møguligum eintøkum av varðveittum negativum ella óinnspældum bondum.

7.3 Endurgjald verður ikki veitt fyri handrit og tøkniligar tekningar.

7.4 Endurgjald fyri skaða á tryggjaðar lutir kann ikki fara upp um tær avtalaðu tryggingarupphæddirnar, indeksjavning íroknað.

7.5 Er virðið á tryggjaðu lutunum hægri enn tryggingarupphæddin, er talan um undirtrygging.

Er innbúsvirðið t.d. tað dupulta av tryggingarupphæddini, ber tað við sær, at sjálvt ein lutvísur skaði bert verður endurgoldin við helvtini av missinum. Í teimum førum í tryggingartreytunum, har ið hægsta tryggingarupphædd serstakliga - beinleiðis ella óbeinleiðis - er tilskilað (t.d. viðvíkjandi pengum, serligum privatum virðislutum og húsdýrum), verður skaðin kortini endurgoldin til fulnar innanfyri tær ásettu upphæddirnar.

**7.6 Skjalprógv.**

Til tess at fáa endurgjald má ein kunna skjalprógva ella gera sannlíkt, at hann hevur havt teir skaddu ella stolnu lutirnar, og at aldur og nýútveganarprísirnir samsvara við tað, ið sett er í skaðafráboðanina.

Hetta kann verða gjørt á tann hátt, at saman við fráboðanini - í tann mun hesar eru til taks - verða sendar kvittanir/keypsrokningar, keypssáttmáli ella nøktandi frágreiðing ella myndir.

Av egnum áhugamálum eigur tryggingartakarin tí at goyma keypsrokningar fyri allar nýggjari lutir og fyri teir haldbetru brúkslutirnar í minsta lagi í 5 ár. Verður keypt privat, eigur ein samstundis at biðja um dagfesta søluváttan - við keypi og prísi ásettum. Til ber eisini harumframt at styðja seg til myndir av virðismestu lutunum. Viðvíkjandi skjalprógvan av nýútveganarprísunum stendur vanliga ikki á at fáa eina váttan frá handilsfólki.

Ber ikki til at skjalprógva ella sanna kravið, er vandi fyri, at felagið kann vísa tí burtur ella áseta endurgjaldið eftir ætli.

Endurgjaldsrætturin fyri súkklustuldur er treytaður av hesum:
- at stellnummarið á súkkluni kann upplýsast,
- at súkklan var útgjørd við føstum lási, góðkendum
- av Dansk Varefakta Nævn ella tryggingarfelagnum, og
- at lásaprógv verður sent saman við skaðafráboðanini.

# C. Ábyrgdartrygging

**Deild 8**

## 8. Privatábyrgd

Tryggingin rindar endurgjald í førum, har hin tryggjaði hevur løgfrøðiliga endurgjaldsábyrgd fyri skaða á fólk og lutir, hendur í tryggingartíðini. Harumframt - t.v.s., uttan nakra løgfrøðiliga endurgjaldsábyrgd - rindar tryggingin fyri skaða, ið smábørn hava verið atvoldin í, sbr. stk. 8.3.1, og gestaboðskaða, sbr. stk. 8.3.2.

Sambært galdandi rætti er persónur vanliga lógfrøðiliga ábyrgdur, um hann orsakað av mistaki ella líkasælu er sekur í skaðanum. Henda meginregla stendur ikki í nakrari lóg, men hevur fest røtur gjøgnum meira enn 200 ára rættarvenju.

Er skaðaelvarin ósekur í skaðanum, verður skaðin nevndur hendiligur, og fyri hendiligan skaða ábyrgdast eingin. Tessvegna má tann, ið hevur verið fyri skaða í slíkari støðu, sjálv(ur) svara fyri missinum.

Umframt hetta kann ein tryggjaður eftir umstøðunum verða álagdur endurgjaldsábyrgd, verða onnur fyri missi, orsakað av bjargingartiltøkum tí tryggjaða til fyrimunar. Tryggingin veitir ikki endurgjald fyri slíka ábyrgd í tann mun, kravið er ikki umfevnt av lóg um vanlukkutrygging og í tann mun, at bjargingaratgerðirnar eru ikki knýttar at vinnu bjargingarmansins.

Ábyrgdartryggingin hevur til endamáls at gjalda fyri ein tryggjaðan, um hesin er endurgjaldsskyldugur - og at hjálpa til at halda tryggjaða skaðaleysan, verður av órøttum endurgjaldskrav sett móti honum ella henni. Hin tryggjaði eigur tí ikki av sær sjálvum at viðurkenna endurgjaldsskyldu ella -krav, tí við hesum verður hann bundin uttan at vera vissur í, um felagið hevur skyldu at gjalda. Verður endurgjaldskrav sett móti tryggjaða, eigur felagnum at verða latið upp í hendur at avgera, hvussu kravið skal verða viðgjørt. Ber hin tryggjaði sjálvur sakarmálskostnaðin, er vandi fyri, at felagið hevur ikki skyldu at veita samsýning. Sí gjøllari hesum viðv. í deild 8.2.

**8.1 Tryggingin fevnir um ábyrgd teirra tryggjaðu**

8.1.1 sum privatpersónar,

8.1.2 sum leigarar mótvegis húsaeigarum sambært galdandi reglum um endurgjaldsskyldu hjá leigara fyri skaða, elvdur av el-innleggingum, sum leigarin hevur fingið gjørt við góðkenning frá útleigara. Tryggingin svarar ikki fyri ábyrgd leigarans av tí leigaða í síni heild,

8.1.3 sum eigari ella brúkari av hestum og øðrum húsdýrum til privata nýtslu. Sí kortini stk. 8.4.6 viðv. hundum,

8.1.4 sum fastognarfólk viðvíkjandi:

8.1.4.1 privatum grundøki og einbýlis- og tvíhúskishúsi sum, um húsini fyri tað mesta verða nýtt til bústað, og tryggjaði býr í teimum og eingin bygningstrygging við reglum um ábyrgdarendurgjald. Sí kortini serstakliga stk. 8.4.5 og 8.4.8,

8.1.4.2 frítíðarhúsum og -grundøki, um eingin bygningstrygging við reglum um ábyrgdarendurgjald er í gildi. Sí kortini serstakliga stk. 8.4.5 og 8.4.8.

**8.2 Viðurkenning av endurgjaldskravi.**
Felagið hevur bert skyldu at rinda tær útreiðslur, ið goldnar eru samsvarandi felagsins góðkenning. Ásannan hins tryggjaða ella rindan av einum endurgjaldskravi bindur ikki felagið. Vandi er fyri, at tryggjaði sjálvur kemur at rinda endurgjaldskravið, um hann viðurkennir tað.

**8.3 Niðanfyri eru sett nøkur eyðkend føri, ið av royndum elva til tvørleika:**

**8.3.1 Skaði elvdur av børnum.**
Børn kunnu á sama hátt sum vaksin verða fyri sjálvstøðugari, løgfrøðiligari endurgjaldsábyrgd. Men samsvarandi rættarvenju ábyrgdast børn yngri enn 5 ár vanliga ikki fyri gerðum teirra og kunnu tí ei heldur gerast endurgjaldsábyrgd. Hóast hetta, rindar tryggingin fyri mannskaða, elvdum av børnum yngri enn 5 ár, um tann tvørrandi løgfrøðiliga ábyrgdin einans viðvíkur aldri ella seinu menningini hjá barninum. Á sama hátt verður goldið fyri skaða á lutir í tann mun, skaðin fer upp um kr. 1500. Er tryggingin teknað við eini hægri, vanligari sjálvsábyrgd, er tað henda almenna sjálvsábyrgdin, ið er galdandi.

Foreldur eru vanliga bert endurgjaldsskyldug fyri skaða, barnið ger, hava tey ikki ansað nóg væl eftir tí.

**8.3.2 Gestaboðskaði.**
Henda tryggingin svarar fyri gestaboðskaða. Gestaboðskaði er skaði á lut, ið berst á undir vanligum privatum samverum, har løgfrøðiliga metingin eyðsæð hevði sloppið skaðaelvaranum undan ábyrgd, júst tí tilburðurin er farin fram undir slíkari samveru.

Ein sjálvsábyrgd upp á kr. 500 er galdandi fyri gestaboðskaða. Í tann mun tryggingin er teknað við eini hægri, almennari sjálvsábyrgd, er tað henda sjálvsábyrgdin, ið er galdandi.

**8.3.3 Skaði elvdur undir útinning av tænastu fyri skaðarakta.**
Dómstólarnir hava lítlan hug, sum við gestaboð-skaðum, at áleggja fólki, ið rætti øðrum eina hjálpandi hond, endurgjaldsábyrgd, berst teimum á undir hesum at skaða lut(ir) hjá honum, ið dugnaður verður. Endurgjaldsábyrgd og tessvegna rindan av endurgjaldi kemur bert uppá tal, um skaðaelvarin hevur verið serliga óansin. Hetta er galdandi, antin beinin verður veittur eftir áheitan ella av eintingum.

# C. Ábyrgdartrygging

**8.3.4 Skaði umfataður av lutatrygging.**
Er skaði umfataður av aðrari trygging hjá skaðaraktum, t.d. húskis-, bygnings- ella vinnutrygging, fellur endurgjaldsábyrgdin hjá skaðaelvaranum burtur sambært Endurgjaldsábyrgdarlógini og eisini ábyrgdarfulnaðurin, uttan so, at skaðin er gjørdur við vilja ella av grovum ósketni.

**8.4 Hesum ábyrgdum verður endurgjald ikki rindað fyri:**

8.4.1 Ábyrgd av skaða, elvdur við vilja, uttan so, at skaðaelvarin er yngri enn 14 ár ella skortar evni at bera seg at við skili, orsakað av sinnisstøðu sínari.

8.4.2 Ábyrgd av skaða, elvdur av sjálvgjørdum fyllskapi ella undir ávirkan av rúsevnum - uttan mun til sinnisstøðuna hjá skaðaelvaranum.

8.4.3 Ábyrgd av skaða, sum einans stavar frá mishaldi av avtalum ella berum fíggjarmissi, sum ikki er fylgja av skaða á fólk ella lut(ir).

8.4.4 Ábyrgd av skaða í sambandi við útinning av vinnu ella arbeiði, ið kann javnsetast við hana.

8.4.5 Ábyrgd av skaða, elvdur av fastognarfólki í sambandi við niðurrívingar-, útgrevstrararbeiði, pilotering o.a. Kortini verður goldið fyri mannskaða.

8.4.6 Ábyrgd av hundaskaða. Lógboðin hundaábyrgdartrygging skal teknast.

8.4.7 Ábyrgd av skaða hendir undir veiðu.

8.4.8 Ábyrgd av dálkingarskaða. Kortini verður goldið fyri slíka ábyrgd, er skaðin hendur av einsæris óhappi og ikki, av tí at hin tryggjaði hevur skúgvað tær til hvørja tíð galdandi almennu fyriskipanir til viks. Dálkingarábyrgd sum húseigari og fastognarfólk er ikki fevnt av tryggingini.

8.4.9 Ábyrgd av skaða elvdur av brúki av motorakfari ella skrásetingarskyldugum loftfari.

**Tryggingin fevnir kortini um ábyrgd av:**

8.4.9.1 Skaða av brúki av koyristóli.

8.4.9.2 Skaða av brúki av leikum við motororku undir 1 hk, eisini mannskaða elvdur av koyring við pinkubilum (gokarts upp til 25 hk).

8.4.9.3 Skaða av brúki av urtagarðsamboðum niðanfyri 5 hk.

8.4.9.4 Skaða á loftfar, motorakfar ella aðrar motorriknar lutir, tá ið 14 ára gomul børn ella yngri hava gjørt skaðan.

8.4.10 Ábyrgd av skaða, av brúki av báti.

Tryggingin fevnir kortini um ábyrgd av:

8.4.10.1 Mannskaða, elvdur av:
- Árabátum - eisini brimfjalum.
- Maskinbátum við maskinorku í mesta lagi 25 hk.

8.4.10.2 Skaða á lutir ella dýr, elvdur av kano, kajakk - somuleiðis árabátum, brimfjalum og øðrum bátum, har longdin í mesta lagi er 5 m. Ein treyt er, at farið um skaðamundið verður ikki rikið av maskinu omanfyri 5 hk.

8.4.11 Ábyrgd av skaða á læntar ella leigaðar lutir ella dýr. Endurgjald kann kortini verða rindað fyri skaðarnar eftir reglunum í 4. deild, er luturin av slagi sínum fevndur av innbústrygginini, sbr. 3. deild. Tryggingin rindar eisini fyri skaða á læntar og leigaðar lutir av teim sløgum, ið nevnd eru í stykkjunum 3.1, 3.2, 3.5 og 3.6, tá ið tað snýr seg um bráðkomnan skaða, hendir hann ein av teim fyrstu 30 døgunum í láns- ella leigutíðini. Sjálvsábyrgd er galdandi - svarandi til 10% av skaðavirðinum - tó í minsta lagi kr. 500. Í tann mun tryggingin er teknað við eini vanligari hægri sjálvsábyrgd, er tað henda vanliga sjálvsábyrgdin, ið er galdandi.

8.4.12 Ábyrgd av skaða á lutir ella dýr, ið viðkomandi tryggjaði

8.4.12.1 eigur,

8.4.12.2 brúkar ella hevur brúkt,

8.4.12.3 goymir, flytir, virkar, viðgerð,

8.4.12.4 hevur lagt undir seg,

8.4.12.5 av øðrum grundum enn hesum frammanfyri hevur undir hond.

Um ábyrgd av skaða á læntar og leigaðar lutir ella dýr er stk. 8.4.11 galdandi.

**8.5 Tryggingarupphæddir.**

8.5.1 Fyri mannskaða verður rindað endurgjald við upp til 5 mió. kr. fyri hvønn tryggingartilburð.

8.5.2 Fyri skaða á lutir og dýr verður rindað endurgjald við upp til 2 mió. kr. fyri hvønn tryggingartilburð.

**8.6 Kostnaður og rentur.**
Tryggingin rindar eisini fyri tær útreiðslur, ið eru goldnar eftir avtalu við felagið í sambandi við avgerð av endurgjaldsspurninginum, hóast farið verður upp um tryggingarupphæddina. Sama er galdandi fyri rentur av endurgjaldsupphædd, fevnd av tryggingini.

# D. Rættarhjálpartrygging

**Deild 9**

## 9. Rættarhjálpartrygging

Tað, ið niðanfyri er sagt um hvat rættarhjálpartryggingin veitir endurgjald fyri, er bert ein ófullfíggjað frágreiðing. Tær fullfíggjaðu treytirnar fáast til hvørja tíð hjá felagnum ella tryggingar-upplýsingini.

Heitt eigur at verða á ein advokat, tí ein treyt fyri endurgjaldi er, at advokatur átekur sær málið.

Rættarhjálpartryggingin rindar útreiðslur í sambandi við ávísar privatar rættarósemjur. Ósemja merkir her rættarlig ósemja. Sum dømi um hvat goldið verður fyri kann nevnast:

- Smærri, privat leigumál.
- Endurgjald (ikki vinna).
- Keyp og søla av innbúgvslutum.
- Ognaríbúðir/lutaíbúðir, um tryggjaði er partur í málinum (og sostatt ikki ognaríbúðar-/lutaíbúðarfelagið).
- Familju- og aðrar privatar tryggingar. Sum dømi um hvat ikki verður goldið fyri, kann verða nevnt:
- Arbeiðs- ella lønarspurningar
- Skatta- og avgjaldsmál
- Flestu familjurættarspurningar
- Upploysn av hjúnalagi ella felagsogn
- Skiftimál
- Revsimál
- Innheintingarmál móti tryggjaða
- Fastogn
- Motorakfør
- Stuttleikabát

(Fastogn, Motorakfør, Stuttleikabát:)
- ið ávikavist er(u) umfatað av: Húsatryggingini, Skrokktryggingini, Skemtifaratryggingini

Tryggingin rindar upp til kr. 75.000. Sjálvsábyrgdin er 10% (í minsta lagi tó kr. 2.500) av kostnaðinum, ið endurgjald verður veitt fyri. Fær tryggjaði fría rættargongd, fellur sjálvsábyrgdin burtur.

# E. Ískoytistrygging fyri innbúgv

**Deildir 10-12**

(Bert galdandi, um tað er tilskilað á forsíðuni á tryggingarskjalinum)

## 10. Glas- og kummutrygging

**10.1 Tryggjaðir lutir:**

10.1.1 Glas, ið er partur av bygninginum.

10.1.2 WC-kummur, brunnar (cisternur), bidets, vask og baðikør. Lutirnir skulu vera í heilársbústaðinum hjá tryggjaða, og teir skulu vera endaliga settir har, teir eiga at vera sum byggilutir í bygninginum.

**10.2 Tryggingin tekur við:**
Tryggingin rindar endurgjald fyri brot, avskalling, skøvur o.tl. á teir tryggjaðu lutirnar, eru teir av hesum vorðnir ónýtiligir.

**10.3 Tryggingin tekur ikki við:**

10.3.1 Holi í termorútum ella leka í samankomingini teirra millum.

10.3.2 Skaða á vakstrarhús.

10.3.3 Skaða á lutir í vinnuhølum, hóast lutirnir sbr. stk. 10.1.2 annars áttu at verið tryggjaðir.

10.3.4 Skaða hendur í sambandi við umbygging, viðlíkahald ella umvæling av tryggjaðu lutunum, rammum, kørmum og tílíkum.

10.3.5 Skaða, sum er fevndur av eini teknaðari bygningstrygging.

10.3.6 Frostspreinging av tryggjaðum lutum, uttan so, at skaðin er elvdur av tørvandi hitaveiting, ið tryggjaði ikki kundi rokna við.

10.3.7 Tilhoyri. Sí kortini stk. 10.4.3.

**10.4 Endurgjaldsuppgerð:**

**10.4.1 Endurútvegan.**
Felagið rindar kostnaðin av at skifta tað skadda út við tilsvarandi nýtt. Heldur tryggjaði uppá, at tilsvarandi lutir fáast ikki, kann felagið lata hinum tryggjaða so mikið í endurgjaldi, sum tað kostar at skifta út glas ella sanitet á sama stigi, og sum er vanligt um skaðamundið.

# E. Ískoytistrygging fyri innbúgv

**10.4.2 Umvæling.**
Felagið rindar kostnaðin av at umvæla tað skadda. Endurgjaldið til rindan av útreiðslunum av umvælingini kann tó ikki verða hægri enn útreiðslurnar av endurútveganini, møguligar uppsetingarútreiðslur íroknaðar.

10.4.3 Ber ikki til at nýta verandi kummusetur og kranar av byggitøkniligum ávum í førum nevnd í stk. 10.4.1 og 10.4.2, verður endurgjald eisini latið fyri nýggj setur og nýggjar kranar av somu góðsku sum tað, ið skatt er.

## 11. Endurgjald fyri el-skaða I

(harðar hvítvørur)

Bert galdandi, um tað er tilskilað á forsíðuni á tryggingarskjalinum

**11.1 Tryggjaðir lutir:**

11.1.1 Elektrisk húshaldstól og harðar hvítvørur o.a., ið lógliga kunnu verða seld ella nýtt í Føroyum, og sum tryggjaði eigur ella hevur viðlíkahaldsskyldu av - eru tey ikki ætlað til vinnuliga nýtslu hjá hinum tryggjaða.

Hámarkið fyri endurgjald er kr. 13.200 fyri hvønn lutin.

Undir **elektrisk húshaldstól** verða roknað:
- Kaffimaskinur.
- Dustsúgvarar.
- Strúkijørn.
- Strúkirullur.
- Køksmaskinur (t.d. miksarar, hvirlur og kjøtmaskinur).
- Elektrisk ítrivsamboð.
- Hárturkarar o.a.
- Rakimaskinur.
- Elektrisk ur.
- Band- og plátuspælarar.
- Forsterkarar.
- Hátalaraútbúnaður.
- Elektrisk ljóðføri.
- Útvarps-, sjónvarps- og sjónbandatól.
- Skrivimaskinur.
- Hústeldur.
- Seymimaskinur.
- Farradio (frároknað útgerð, ið krevur sendiloyvi)

Til **harðar hvítvørur** o.a. verða roknað:
- Køliskáp.
- Frystiboksir.
- Komfýrar.
- Kókiplátur.
- Ovnar.
- Uppvaskimaskinur.
- Vaskimaskinur.
- Turkitrumlur.
- El-radiatorar.
- Vatnhitarar.
- Olju- og gassfýringar o.a.

**11.2 Tryggingin tekur við:**

11.2.1 Tryggingin tekur við hvørjum skaða á elektriskar leiðingar ella komponentar í undannevndu tólum, ið berst á av skammlopi, íleiðslu (induktión), yvirspenningi ella tílíkum.

11.2.2 Umframt skaða á elektriskar lutir verður endurgjald eisini goldið fyri annan skaða á tólið, ið hendur er í sambandi við sjálvan el-skaðan.

**11.3 Tryggingin tekur ikki við:**

11.3.1 Skaða, ið er undantikin tryggingartreytunum (deild 20).

11.3.2 Í tann mun, garanti- og tænastuavtalur rinda fyri skaðan.

11.3.3 Skaða, ið stendst av skeivari konstruktión-, uppsetingarbreki, skeivari íbinding, skeivari umvæling ella skaða, ið hendir undir umvæling.

11.3.4 Skaða, ið stendst av, at tólið er vorðið overvað ella ikki er brúkt, sum ætlað ella gjørt til.

11.3.5 Skaða á aðrar lutir enn teir, ið eru tryggjaðir sambært verandi ískoytisendurgjaldi.

11.3.6 Skaða, teknað brunatrygging rindar endurgjald fyri.

11.3.7 Skaða á lutir, ið bert eru ætlaðir til nýtslu uttandura.

**11.4 Endurgjaldsuppgerð:**
Skaðin verður gjørdur upp svarandi til kostnaðin at umvæla skadda lutin. Upphæddin kann tó ikki fara upp um virðið á skadda tólinum, roknað út eftir endurgjaldsreglunum viðv. endurútvegan. Ber ikki til at umvæla tólið, verður støði tikið í prísinum á nýggjum samlíkum tóli, ella fæst slíkt tól ikki, tóli av sama slagi. Endurgjald fyri endurútvegan verður javnað eftir aldrinum á tí skadda um skaðamundið eftir hesi talvuni:

| Aldur | |
|---|---|
| 0 - 2 ár | 100% |
| 2 - 3 ár | 80% |
| 3 - 4 ár | 70% |
| 4 - 5 ár | 60% |
| 5 - 6 ár | 40% |
| eldri enn 6 ár | 20% |

# E. Ískoytistrygging fyri innbúgv

## 12. Endurgjald fyri el-skaða II
(uttan harðar hvítvørur)

Bert galdandi, um tað er tilskilað á forsíðuni á tryggingarskjalinum

**12.1 Tryggjaðir lutir:**

12.1.1 Elektrisk húshaldstól o.a., ið lógliga kunnu verða seld ella nýtt í Føroyum, og sum tryggjaði eigur ella hevur viðlíkahaldsskyldu av - eru tey ikki ætlað til vinnuliga nýtslu hjá hinum tryggjaða.

Hámarkið fyri endurgjaldið er kr. 13.200 fyri hvønn lutin.

Undir **elektrisk húshaldstól** verða roknað:
- Kaffimaskinur.
- Dustsúgvarar.
- Strúkijørn.
- Strúkirullur.
- Køksmaskinur (t.d. miksarar, hvirlur og kjøtmaskinur).
- Elektrisk ítrivsamboð.
- Hárturkarar o.a.
- Rakimaskinur.
- Elektrisk ur.
- Band- og plátuspælarar.
- Forsterkarar.
- Hátalaraútbúnaður.
- Elektrisk ljóðføri.
- Útvarps-, sjónvarps- og sjónbandatól.
- Skrivimaskinur.
- Hústeldur.
- Seymimaskinur.
- Farradio (frároknað útgerð, ið krevur sendiloyvi).

**12.2 Tryggingin tekur við:**

12.2.1 Tryggingin tekur við hvørjum skaða á elektriskar leiðingar ella komponentar í undannevndu tólum, ið berst á av skammlopi, íleiðslu (induktión), yvir-spenningi ella tíllíkum.

12.2.2 Umframt skaða á elektriskar lutir verður endurgjald eisini goldið fyri annan skaða á tólið, hendir er í sambandi við sjálvan el-skaðan.

**12.3 Tryggingin tekur ikki við:**

12.3.1 Skaða, ið er undantikin sambært tryggingartreytunum (deild 20).

12.3.2 Í tann mun, garanti- og tænastuavtalur rindað fyri skaðan.

12.3.3 Skaða, ið stendst av skeivari konstruktión-, uppsetingarbreki, skeivari íbinding, skeivari umvæling ella skaða, ið hendir undir umvælingini.

12.3.4 Skaða, ið stendst av, at tólið er vorðið overvað ella ikki er brúkt, sum ætlað ella gjørt til.

12.3.5 Skaða á aðrar lutir enn teir, ið eru tryggjaðir sambært verandi ískoytisendurgjaldi.

12.3.6 Skaða, teknað brunatrygging rindar endurgjald fyri.

12.3.7 Skaða á lutir, ið bert eru ætlaðir til nýtslu uttandura.

**12.4 Endurgjaldsuppgerð:**
Skaðin verður gjørdur upp svarandi til kostnaðin av at umvæla skadda lutin.

Upphæddin kann tó ikki fara upp um virðið á skadda tólinum, roknað út eftir endurgjaldsreglunum viðv. endurútvegan.

Ber ikki til at umvæla tólið, verður støði tikið í prísinum á nýggjum samlíkum tóli ella fæst slíkt tól ikki, tóli av sama slagi.

Endurgjald fyri endurútvegan verður javnað eftir aldrinum á tí skadda um skaðamundið eftir hesi talvuni:

| Aldur | |
|---|---|
| 0 - 2 ár | 100% |
| 2 - 3 ár | 80% |
| 3 - 4 ár | 70% |
| 4 - 5 ár | 60% |
| 5 - 6 ár | 40% |
| eldri enn 6 ár | 20% |

# F. Felagsreglur

**Deildir 13-22**

## 13. Rindan av tryggingargjaldi

13.1 Fyrsta tryggingargjaldið fellur til gjaldingar, tá ið tryggingin tekur við, og seinnu tryggingargjøld á tilskilaðu forfalsdøgunum.

13.2 Tryggingargjaldið verður kravt gjøgnum giro og saman við gjaldinum verður kravt uppkravsgjald

13.3 Verður tryggingargjaldið - sambært avtalu - kravt á annan hátt, ber tryggingartakarin sjálvur eyka-útreiðslurnar, ið standast av hesum.

13.4 Gjaldskrav verður sent til tann gjaldsstað, ið tryggingartakarin hevur givið upp. Verður flutt, skal nýggi gjaldsstaðurin verða boðaður tryggingini beinanvegin.

13.5 Verður tryggingargjaldið ikki goldið, sendir felagið áminning um rindan av tryggingargjaldinum. Áðrenn áminningin verður send, skulu í minsta lagi 14 dagar verða gingnir frá gjalddegnum. Í áminningini verður sagt frá, at endurgjaldsskyldan hjá tryggingini fellur burtur, er tryggingargjaldið ikki goldið í seinasta lagi 14 dagar eftir, at áminningin er send tryggingar-takaranum.

13.6 Hevur felagið sent út áminningarskriv, hevur tað rætt til at krevja avgreiðslugjald.

## 14. Indeksjavnan av tryggingargjaldi, tryggingarupphæddum og sjálvsábyrgd

Tryggingargjaldið og tær ásettu upphæddirnar og sjálvsábyrgd fyri innbúgvstrygging verður indeks-javnað, sambært teim kunngjørdu nýtiligu vísitølum frá Hagstovu Føroya.

Verða eingi nýtilig almenn vísitøl kunngjørd, hevur Trygd rætt til at indeksjavna við øðrum grundarlagi.

## 15. Aðrar broytingar av tryggingargjaldi, tryggingarupphæddum, sjálvsábyrgd ella tryggingartreytum

Ætlar felagið at gera aðrar broytingar av tryggingar-treytum, tryggingargjaldi, tryggingarupphæddum og sjálvsábyrgdum enn broytingar eftir deild 14., kunnu hesar broytingar bert verða gjørdar, tá eitt av tryggingarskeiðinum er við at vera runnið sambært tryggingarskjalinum og við teirri uppsagnarfreist, ið er tilskilað í stk. 16.1.

Verður broytingin gjørd í sambandi við skaða, er stk. 16.2 galdandi.

## 16. Gildistíð og uppsøgn

16.1 Tryggingin er teknað fyri eitt ár ísenn og er framhaldandi, inntil hon av øðrum av pørtunum skrivliga verður søgd upp við í minsta lagi einum mánað varningi til endan av einum tryggingarskeiði.

16.2 Eftir hvønn fráboðaðan skaða kann tryggingartakarin eins væl og felagið - upp í 14 dagar eftir, at endurgjaldið er goldið ella sýtt er fyri at taka við skaðanum - slíta tryggingaravtaluna, við 14 daga varningi.

## 17. Flyting og váðabroyting

**17.1 Felagið skal hava fráboðan:**

17.1.1 Flytir tryggingartakarin í annan heilársbústað (nýggjan tryggingarstað). Sagt skal eisini verða frá, um nýggi heilársbústaðurin hevur annað slag av taki.

17.1.2 Verður takið á heilársbústaðinum broytt til flagtak ella frá flagtaki til annað tak.

17.1.3 Verður omanfyri fráboðan ikki send, kann hetta bera við sær, at endurgjaldsrætturin fellur heilt ella lutvíst burtur sambært ásetingunum í Tryggingaravtalulógini hesum viðvíkjandi.

17.2 Tey viðurskifti, ið nevnd er undir punkt 17.1.1 til 17.1.3 kunnu harumframt ávirka tryggingargjald ella sjálvsábyrgd upp- ella niðureftir.

## 18. Skaðafráboðan

18.1 Allur skaði skal beinanvegin verða boðaður tryggingarfelagnum.

18.2 Stuldur, rán, álop og herverk skulu harumframt straks boðast løgregluni. Barst skaðin á uttanlands, skal skrivlig váttan frá útlendsku løgregluni á staðnum leggjast saman við fráboðanini til felagið.

18.3 Stuldur í almennum flutningsførum ella almennum hølum, skúla, gistingarhúsi og tílíkum skal skjótast gjørligt verða boðaður løgregluni - og letur tað seg gera - eisini tí, ið við ábyrgdini situr á staðnum.

18.4 Verður ikki gjørt eftir omanfyri nevndu fyriskipanum, kann hetta fáa týdning fyri endurgjaldsskylduna hjá felagnum sambært reglunum í Tryggingaravtalulógini hesum viðvíkjandi.

18.5 Við fráboðan um stuldursskaða má hin tryggjaði gera sannlíkt, at stolið er, av tí at gloymdir, burturmistir ella mislagdir lutir verða ikki endurgoldnir.

# F. Felagsreglur

## 19. Trygging í øðrum felagi

Er trygging teknað í øðrum felagið fyri sama váða og hevur hetta felagið tikið fyrivarni um at tilsvarið fellur burtur ella lækkar, um trygging er teknað í øðrum felagi, er sama fyrivarni galdandi í hesi tryggingini, og tryggingarnar rinda lutfalsliga endurgjaldið.

## 20. Krígs-, jarðskjálvta- og kjarnorkuskaði

Tryggingin tekur ikki við skaða, ið stendst av:

20.1 Kríggi, viðurskiftum álík kríggi, broti á uttanpartsstøðu, borgarakríggi, uppreisturi ella innanlendis ófriði.

Tryggingin tekur tó við upp til ein mánað frá tí, stríðið brast á, gerast tílíkar hendingar í landi, har ið hin tryggjaði er staddur á ferð uttanlands. Gingið verður út frá, at farið verður ikki í eitt land, ið statt er í onkrari av teim lýstu støðunum.

20.2 Jarðskjálvta ella øðrum náttúruólagi í Føroyum. Tó verður goldið í Danmark og Grønlandi.

20.3 Sleppur kjarnorka ella geislavirkin máttur út.

## 21. Kærunevndin

Verður ósemja millum tryggjaða og felagið um tryggingina, og fæst ikki nøktandi úrslit við at venda sær til felagið av nýggjum, kann tryggjaði kæra til:

Ankenævnet for Forsikring
Anker Heegaards Gade 2
1572 København V
Tlf +45 33 15 89 00
kl. 10.00-13.00 donsk tíð

Kærur til kærunevndina skulu verða skrivaðar á serligt kærublað, og ein lítil ágáva skal gjaldast. Kærublað og girokort til ágávugjald kunnu fáast frá:

Høvuðskrivstovu felagsins

## 22. Sjálvsábyrgd

Tað er tilskilað í tryggingarskjalinum, um tryggingin er teknað við vanligari sjálvsábyrgd. Vart verður gjørt við at serligar reglur um sjálvsábyrgd eru galdandi í ávísum førum sambært tryggingartreytunum stk. 4.3.1.4, 8.3.1, 8.3.2, 8.4.11 og 9.

SENDISTOVAN Svanamerktur prentlutur, 541 705

**P/F Trygd**
**Tryggingarfelag**

**Gongin 7**
**P.O. Box 44**
**FO-110 Tórshavn**
**Faroe Islands**

**Tel +298 358 100**
**Fax +298 317 211**
**trygd@trygd.fo**
**www.trygd.fo**

**Trygd hugsar um teg**